Tredivu uppskot borin í tingið

JOHN JOHANNESSEN

Seinastu dagarnir hava landsstýrisfundir verið hildnir bæði árla og síla. Orsøkin hevur verið, at í gjár var seinasta freist at bera løgtinginum tey uppskot, ið skulu leggjast fram hesa tingsetuna.

Talið av uppskotum, landsstýrið bar løgtingsskrivstovuni í gjár, lá um tey tredivu. Ikki bar heilt til hjá embætisfólkunum í Tinganesi at siga okkum nágreiniliga talið, tá vit tosaðu við tey eftir døgurða í gjár.

Fólk sótu nevniliga og løgdu seinastu hondina á fleiri av uppskotunum heilt til tíðarfreistina í gjár. Tí var einki nágreiniligt yvirlit yvir, hvørji og hvussu nógv uppskotini vóru.

Millum málini, ið borin vórðu niðan í tingið í gjár, vóru fýra mál til aðalorðaskiftis. Hesi vóru hernaðarmál, landbúnaðarpolitikkur, lóggávupolitikkur og fíggjar- og búskaparpolitikkur.

Á løgtingsskrivstovuni siga tey seg fáa nógv at gera, nú øll hesi málini skulu leggjast fyri tingið.

Árliga »Giljanestiltakið« verður sunnudagin

ÓLAVUR Í BEITI

Skráin fyri árliga »Giljanestiltakinum«, sum Lions Club Vágar skipar fyri sunnudagin, er sera fjølbroytt. Har verður mat- og køkutombula, loppumarknaður, 21-spæl, tombola, fiskibrunnur, skjótitjald, ís søla, bóltspark og tunnusláin fyri at nevna okkurt, sum skipað verður fyri. Og klokkan 17.00, ein tíma eftir at Heini F. Petersen hevur sett »Giljanestiltakið« verður eydnuhjól. At vinna á eydnuhjólinum er ein skutari, ferðaseðlar, gávukort, olja og annað mangt.

Umframt alt hetta, verða eisini tríggir teir vakrastu urtagarðarnir valdir í øllum bygdunum í Vágum, og sum nakað nýtt fáa tey, sum koma til »Giljanestiltakið« eisini møguleika at velja. Klokkan 21.30 endar so møguleikin at velja vakrastu urtagarðar í Vágum.

Hjartatól

Av øðrum undirhaldi kann nevnast, at sang- og tónleikarbólkurin Dorethea syngur klokkan 17.30, og klokkan 20.00 kemur »Upp á tá« at vísa okkurt forkunnugt og áhugavert.

Sum undanfarin ár kemur ágóðin av »Giljanestiltakinum« onkrum serligum til góðar, og í ár verður eitt hjartatól, diffibilator, handaður sjúkrabilinum í Vágum. Handanin verður klokkan 19.50.

Uml. klokkan 23 endar so stóra og áhugaverda »Giljanestiltakið«, og tá verða lutaseðlarnir drignir og eisini úrslitið av urtagarðsvalinum kunngjørt.

Í tíðindaskrivi frá Lions Club Vágar verður eisini nevnt, at gjørligt er at keypa sær mat og drekka á tiltakinmum, og felagið vónar, at undirtøkan verður líka stór sum hini árini.

Gýtingarleiðin verður oydd

Í blaðnum í gjár bórust tíðindi um, at fiskimálaráðharrin hevur gjørt av at lata allar kassar vestanfyri og norðanfyri upp fyri várróðuri við snellu.

Men útróðrarmenn á Sandoynni eru ikki samdir í, at allir kassar eru latnir upp. Teir vísa á, at økini, sum latin eru upp til snellufiskiskap vestanfyri eru øki uttan fyri alla gýtingarleið. Sostætt fáa teir einki burturúr várróðurinum, siga teir.

Sambært útróðrarmonnunum hava línuskipnini haraftarímóti fingið góðar sømdir. Tey sleppa at fiska lagt inn í gýtingarøkini, meðan útróðrararbátarnir noyðast út á 12 til 15 fjóðringar millum størru bátarnar at royna.

Hetta halda útróðrarmenn á Sandoynni vera ógvuliga óheppi, tí í løtuni er stongt norðanfyri, og tí er vandi fyri rættuligari ovurfisking vestanfyri.

Útróðrarmenninir heita tískil á fiskimálaráðharran um at betra um sømdirnar hjá útróðrarmonnum kring alt landið sum skjótast.

jojo

Innkrevjing í skeljasori

ÓLAVUR Í BEITI

Eftirstøðumar vaksa aftur fullkomiliga ótálmaðar, og eingin kann í dag siga nakað ítøkiligt um, hvussu stórar hesar eru, burturs æð frá mvg-skuld og skattaskuld, sigur Jóannes Eidesgaard í viðmerkingunum til fyrispurning

Jóannes Eidesgaard, tingmaður, hevur sett Karsteni Hansen, fíggjarmálaráðharra, heilar 11 spurningar viðvíkjandi DEMM-skipanini og Innkrevjingardeildini. M.a. vilæ Jóannes Eidesgaard hava at vita, hvørjar grundgevingar vóru fyri at flyta innkrevjingina frá Gjaldstovuni til Toll- og Skattstovuna? Hvussu hevur gongdin í eftirstøðum verið síðan juli 1999 og fram til dagin í dag? Hvat kostaði flytingin í nýggj høli á Hálsi, keyp av nýggjum tólum og innbúgvi, og hvat er leiguprísurin? Hvussu er støðan í dag viðvíkjandi skráseting, mótrokning og innkrevjing av almennari skuld? Hvørji stig ætlar landsstýrismaðurin at taka til tess at tryggja, at samfelagsins áhugamál viðvíkjandi innkrevjing av almennari skuld verða nøktandi røkt?

Í viðmerkingunum sigur Jóannes Eidesgaard um gongdina, at á fíggjarlógini fyri 1995 vórðu settar 7 mió. kr. av til eina centrala innkrevjingar- og fíggarstýringsskipan, harav tær 3 mió. kr. fóru til sokallaðu DEMM-skipanina, sum stendur fyri debitor-eftirstøður-mótrokning-málsviðgerð. Hetta var ein skipan, ið varð gjørd í samstarvi millum Føroya Gjaldstovu og Kommunedata. DEMM-skipanin fór at virka í september 1995, men varð alment tikin í nýtslu 11. mars 1996. Innkrevjingardeildin lá tá undir Føroya Gjaldstovu.

Skuldin minkað

Og sambært einum yvirliti um gongdina í samlaðu eftirstøðuni, vísur Jóannes Eidesgaard á, at almenna skuldin er minkað við sløkum 170 mió. kr. eftir fýra árum. So út frá allýsingini hjá landsstýrinum á heysti 1996, so kann ikki sigast annað enn, at Innkrevjingardeildin í verki veruliga hevur víst týdningin av orðinum effektivitetur, og at DEMM-skipanin hevur livað fult upp til tað, sum m.a. eisini løgtingsmenn væntaðu.

– Um tað er eitt av okkara eyðkennum, tað vóni eg ikki tað er, so er tað nógv, sum bendir á, at tað sum virkar, tað skal syndrast, meðan ov lítil orka verður brúkt til tað, sum ikki virkar, sum tað skal, sigur Jóannes Eidesgaard.

Og víðari greiður hann frá, at tíðliga í 1998 so eru røddir frammi um, at Innkrevjingardeildin nú ikki skuldi liggja undir Føroya Gjaldstovu, men skuldi flytast til Toll- og Skattstovuna. Onkur vildi vera við, at hetta var sambært bygnaðarbroytingunum hjá Finn Normann Christensen. Onnur vildu vera við, at tað ikki var pláss fyri Innkrevjingardeildini úti í Albert Hall. Uppaftur onnur vildu vera við, at innkrevjingin var ein náttúrligur partur av virkisøkinum hjá Toll- og Skattstovuni, meðan tað eftir øllum at døma ikki hoyrdi undir náttúrliga virkisøkið hjá Gjaldstovuni, hóast hon her hevði virkað framúr væl.

– Úrslitið verður so, at í apríl 1998 flytur Innkrevjingardeildin frá Gjaldstovuni til Toll- og Skattstovuna. Vit høvdu eitt orðasklifti á tingi á heysti 1998, har vit vóru nøkur, sum mæltu frá hesi flyting. Men landsstýrismaðurin segði, at tann avgerðin var tikin.

– Nýggjur leiðari verður settur 1. mars 1999, og gongdina síðani tá kenna tingmenn frá fjølmiðlunum og frá tí brævi, sum Starvsmannfelagið hevur sent Løgtinginum. Haraftrat vænta vit, at landsstýrismaðurin fer at geva tinginum eina frágreiðing, sigur Jóannes Eidesgaard.

Syrgilig søga

– Skal takast samanum hesa syrgiligu søgu, sum annars sá so ljós út, so hava vit í dag snøgt sagt onga innkrevjing, og tað er ikki at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at øll innkrevjing liggur í skelja sori bæði menniskjansliga og tekniskt.

– Eftirstøðurnar vaksa aftur fullkomiliga ótálmaðar, og eingin kann í dag siga nakað ítøkiligt um, hvussu stórar hesar eru, burtursæð frá mvg-skuld og skattaskuld. Tað fer eingin skipað skráseting fram, og tað fer als eingin mótrokning fram.

– Talan hevur verið um, at í staðin skuldi koma ein føroyskt framleidd innkrevjingarskipan, men í løtuni sær ikki út til, at nøkur nýggj skipan kemur í bræði, og óvist er, hvussu góð hon verður, um ikki nóg nógv orka og játtan verður latin. Eitt framhald av DEMM-skipanini hevði kravt eina uppgradering, sum møguliga hevði kostað um einar 2 til 3 mió. kr.

– Løgtingið, sum í sínari tíð játtaði neyðugu upphæddina til eina effektiva innkrevjing við DEMM-skipanini, eigur at fáa at vita frá landsstýrismanninum, hvørjar frágreiðingar og grundgevingar hann hevur fyri, at alt hetta fyri samfelagið so týdningarmikla øki liggur í skeljum, sigur Jóannes Eidesgaard m.a. í viðmerkingunum.

Endurgjald fyri niðurlagdar sjóvegis farleiðir

Landsstýrið heldur, at tað skal bera til at rinda kommunum endurgjald í sambandi við, at sjóvegis farleiðir hjá SL verða lagdar niður

ÓLAVUR Í BEITI

Fnnbogi Arge, landsstýrismaður, leggur nú uppskot til løgtingslóg um endurgjald til komunur í sambandi við, at sjóvegis farleiðir hjá Strandfaraskipum Landsins verða lagdar niður.

Í viðmerkingunum, sigur Finnbogi Arge, at endamálið við lógaruppskotinum er at gera almennar lógarreglur um, hvussu verða skal við fíggjarligu viðurskiftunum millum land og kommunur í sambandi við, at sjóvegis farleiðir hjá Strandfaraskipum Landsins (SL) til ella frá kommunalum havnum ella bryggjum verða lagdar niður.

Fyri skip hjá SL í sigling innannlands eftir eini ferðaætlan, og fyri vørur, sum verða fluttar við teimum, verður rindað eitt fast, mánaðarligt gjald, sum verður ásett av Landsverkfrøðingsstovninum eftir samráð við Starvsnevnd Føroysku Havna og SL eina ferð um árið tann 1. juni at galda fyri komandi fíggjarár.

– Samlaða árliga gjaldið frá landinum til kommununar eftir omanfyri nevndu reglum er uml. 4 mió. krónur. Verður farleið til kommunu løgd niður, fær kommunan ikki hesar inntøkurnar, vísur Finnbogi Arge á í viðmerkingunum.

Og víðari verður sagt, at eftir vanligum endurgjaldsreglum hevur kommunan einki juridiskt krav mótvegis landinum, um sjóvegis samband verður niðurlagt, og einki annað serligt grundarlag er fyri at rinda kommununum endurgjald í tí sambandinum.

– Eftir uppskotinum verður endurgjaldið ásett sum ein samlað upphædd, svarandi til samlaða gjaldið frá landskassanum í 5 ár fyri sigling til kommununa. Grundarlagið fyri útroknningini er árliga miðalinntøkan av gjøldunum hjá kommununi seinastu 3 árini undan niðurleggingini.

– So hvørt, sum annað samband verður stovnsett millum oyggjarnar, verður sjálvandi aktuelt at niðurleggja sjóvegis sambandið, sum er í dag, og her verður sambandið Vestmanna - Oyragjógv kanska fyrst aktuelt. Við teimum gjøldum, sum í dag eru galdandi, hevði niðurleggingin av hesum sambandinum kostað landskassanum uml. 3 mió. kr, sum hevði verið tilsvarandi inntøka hjá kommunukassanum, sigur Finnbogi Arge m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

Níggju BP-fólk við leiguflogfari

JAN MÜLLER

Í dag koma níggju fólk frá eini av heimsins størstu fyritøkum, BP Amoco, til Føroya við leiguflogfari beinleiðis úr Bretlandi. Ferðin er liður í fyrireikingunum hjá BP Amoco til oljuleiting á føroyska landgrunninum.

BP Amoco hevur verið virkið á føroyaøkinum nú í fleiri ár og hevur gjørt eitt rættiliga stórt tøknilligt arbeiði nú undan 1. útbjóðing. Blaðið skilur, at BP Amoco eftir øllum at døma verður millum oljufeløgini, sum fara at søkja um loyvi at bora á landgrunninum.

Tey mongu útlendsku oljufeløgini skulu hava fundir við føroyskar oljumyndugleikar fyri at kunna teir um, hvussu langt felagið er komið við sínum kanningum. Eisini verður høvi undir vitjanini at hitta umboð fyri ymsar partar av føroyskum vinnulívi, almennar stovnar ol.

Leiðin gongur eisini út í Tinganes, har BP-fólkini skulu hitta Anfinn Kallsberg, løgmann. Ein heilur tími er settur av til henda fundin.

Ein møgulig umsókn frá einum tí størsta oljurisanum í heiminum at bora á landgrunninum er helst ein av teimum, sum føroyskir oljumyndugleikar bíða við spenningi eftir. Tí nettupp BP Amoco er tað oljufelagið, sum hevur mestu roynd-irnar frá oljuøkjunum beint við føroyska markið. BP Amoco er í dag operatørur á báðum oljufeltunum vestan fyri Hetland, Foinaven og Schiehallion.

Tað er tí greitt, at BP Amoco hevur mong ítøkilig úrslit at vísa á frá økjum, sum liggja stutt frá føroysku teigunum, ið eru bodnir út.

Tað hevur eisini verið gitt, at møguligar oljugoymslur, sum BP Amoco kann hava funnið skamt frá markinum, kunnu halda fram inn á føroyskt øki. Er nakað í hesum má metast, at BP Amoco hevur serstakan áhuga fyri ávísum teigum føroysku megin markið. M.a. hevur skotska blaðið Press & Journal gjørt nógv burtur úr einum brunni, „Conival", sum BP Amoco hevur borað tætt upp at markinum, men sum felagið enn ikki hevur viljað latið nakrar upplýsingar um.

Oddamaðurin í stóra BP Amoco bólkinum, ið kemur til Føroya í dag, er Peter Rattey, stjóri. Hetta er fyrsta vitjan hansara í Føroyum.

Syndra samhaldsfestið

Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur nógvar ábendingar vera um, at borgarligu kreftirnar nýta fullveldismálið til at styrkja seg politiskt. Hetta ætlar hann ikki at góðtaka

ÁKI BERTHOLDSEN

– Fullveldi ella ikki: Vit fara altíð at kenna okkara vitjanartíð, og vit fara altíð at seta okkara sjálvsøgdu krøv fram.

– Og vit fara eisini at vísa í verki, at vit hava styrki til at gera tað.

Boðskapurin frá Gunnleivi Dalsgarð, formanni í Starvsmannafelagnum til føroysku politikararnir, er púra greiður.

Eftir at hava eygleitt politisku gongdina seinastu tíðina heldur hann tað vera neyðugt at ávara føroyskar politikarar ímóti at ganga limunum í Starvsmannafelagnum ov nær

Og tað gjørdi hann so á aðalfundinum í Starvsmannafelagnum um vikuskiftið.

– Vit fara aldrin at offra okkum afturfyri at ávísar politiskar ætlanir kunnu verða settar í verk, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Mugu ikki fyrigykla

Starvsmannafelagið hevur altíð víst teimum týðandi samfelagsviðurskiftunum ans

Og í hesum døgum er tað ikki løgið, at tað einahelst er fullveldismálið, sum hevur stóran áhuga hjá felagnum

Men tað skilst á øllum brøgdum, at Starvsmannafelagið er heldur ivasamt um gongdina í fullveldismálinum og tað er m.a. hetta sum fær felagið at lyfta fremstafingur ímóti politikarum.

– At broytingar verða gjørdar í ríkisrættarligu støðu okkara, er bæði rætt og rímiligt og tað ásanna eisini allir politiskir flokkar.

– Men vit mugu sláa fast, at eins væl og vit fóru á heysin í ríkisfelagsskapinum, har ríkisstuðulin ikki kundi forða fyri lønarniðurskurið og reallønarfalli, kunnu vit eisini fara tað, um vit fáa fullveldi.

– Tí tað er altíð dygdin í politiska valdinum, sum er avgerandi.

Gunnleivur Dalsgarð at tað er eitt krav til politikarar, at teir eru sannir, og ikki geva fólki falskar vónir um eitt samfelag við fullveldi, eins og teir politikarar, sum vilja varðveita ríkisfelagsskapin, ikki mugu fyrigykla fólki, at ríkisstuðulin er loysnin og bjargingin í allar ævir, tí hann kann hvørva, uttan vit vilja tað, ella ikki, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Ivasamir um gongdina

Men annars er tað týðiligt, at Starvsmannafelagið er heldur ivasamt um gongdina.

– Tað tykist sum um tær borgarligu kreftirnar í Føroyumeru farnar at brúka fullveldismálið sum skálkaskjól til at styrkja seg politiskt.

– Avleiðingin av tí verður, at tað samhaldsfasta samfelagið verður syndrað, og tað fara vit undir ongum umstøðum at at taka undir við, tí tað fer sjálvsagt eisini at ávirka okkara viðurskifti.

Formaðurin í Starvsmannafelagið sigur, at hjá summum politikarum ber onki til hjá almennum stovnum, uttan at teir verða privatiseraðir.

– Her eru tað alt ov nógv og greflig spor sum ræða, tí tað verður ongantíð eitt sunt og gott samfelag, sum spyrst burturúr at flyta samfelagsvirðini yvir til tað privata at skalta ov valta við, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hinvegin hava vit ongantíð fingið at vita, hví tað partú er neyðugt at privatisera almennar stovnar.

– Verður tað gjørt, fer tað at taka grundarlagið undan tí samhaldsfasta samfelagnum.

– Og tað kunnu vit ikki góðtaka, fullveldi ella ikki,

Vita ov lítið

Annars leggur formaðurin í Starvsmannafelagnum dent á, at enn veit hann ov lítið um fullveldisætlanina til at hann kann siga nakað um, hvørja støðu, hann fer at taka og hvat hann annars, sum fakfelagsformaður, kanska fer at mæla sínum limum til at gera.

– Enn vita vit alt ov lítið ítøkiligt um, hvat ætlanin er.

– Men tað er púra greitt, at vit fara ikki at offra okkara rættindi fyri at fáa ávís, onnur, politisk mál íggjognum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Men fyrrenn meiri ítøkiligt er komið fram um fullveldismálið, hevur hann ongan hug til at leggja seg út í eitt orðaskifti um ríkisrættarligu støðuna.

Hann sigur, at hann fyrr hevur sóknast eftir, at tað er komið ov lítið fram um tær politisku ætlanirnar og enn er støðan óbroytt í so máta

Sjúkt sjúkrahúsverk

Miðflokkurin vísir í landsfundarsamtykt síni á, at hann harmast um handfaring myndugleikanna av heilsuøkinum

JOHN JOHANNESSEN

Eitt av málunum, Miðflokkurin viðgjørdi á landsfundi sínum leygardagin, var støðan innan heilsuøkið. Niðurstøðan av hesi viðger var, at sjúkrahúsverkið er sjúkt og tørvar viðgerð.

Í hesum sambandi harmast flokkurin á ta handfaring, heilsumál fáa frá myndugleikunum. Flokkurin harmast um, at sjúkrahúsini ikki verða hildin við líka, at stríð er millum fakbólkarnar, at nýggjur stjóri ikki er settur á Landssjúkrahúsinum og at ov lítið av peningi verður játtað sjúkrahúsunum til at keypa tól fyri.

Alt hetta heldur Miðflokkurin er við at máa støðið undan sjúkraviðgerðini og sostætt eisini tryggleika sjúklinganna.

Persónsskatturin ov hagur

Miðflokkurin heldur tað vera átaluvert, at landsstýrið hevur í hyggju at lækka partafelagsskattin samstundis, sum persónsskatturin er alt ov høgur. Hetta, heldur flokkurin, vera at gera korini hjá teimum lág- og miðalløntu ósømilig.

Víst verður í hesum sambandi á, at tey, sum eiga pening í partafeløgum, eru ikki tann samfelagsbólkurin, ið mest hevur brúk fyri einum skattalætta.

– At lækka partafelagsskattin er at økja um eigingognina og sostætt ogn partaeigaranna.

Miðflokkurin heitir tí í landsfundarsamtykt síni á landsstýrissamgonguna um at gera nakað við skattatrýstið á lág- og miðalinntøkurnar.

Landsfundur Miðfloksins fegnast annars um, at Føroyar hava búskaparliga framgongd, og heitir hann á myndugleikarnar um at lata framgongdina koma teimum verri stillaðu samfelagsbólkunum og útjaðaranum til góðar.

Røtt kós í fullveldismálinum

Fullveldismálið varð eisini viðgjørt á landsfundi Miðfloksins leygardagin. Niðurstøðan av viðgerðini var, at flokkuri tekur undir við teirri kós, løgtingsumboð floksins, Jenis av Rana, hevur valt í viðgerðini av málinum.

Flokkurin heldur tað vera av alstórum týdingi, at fólkarætturin verður virdur, og tí vil hann virka fyri, at málið verður lýst so væl sum til ber. Eisini heldur hann tað hava týdning, at fólkið fær seinasta orðið at siga í málinum.

Virða trúnna

Landsfundur Miðfloksins viðgjørdi eisini átrúnaðarlig sjónarmið á landsfundinum, og sluppu hesi eisini upp í part í landsfundarsamtyktini.

Flokkurin heitir á allar føroyingar um at venda aftur tl tey kristnu lívsvirðini. Hesi, heldur flokkurin, vera besta grundarlag føroyinga at byggja framtíðina á.

Miðflokkurin heitir eisini á myndugleikarnar um at tryggja, at fosturtøkulógirnar verða hildnar, og at Guðgivna hjúnarbandið verður virt.